# Jólaaftan í KFUK

## Aftur í ár halda tey jólaaftan í KFUK í Havn

Tað eru ikki øll, sum hava møguleika at vera asman við sínum kæru á jólum, og tað kunnu vera so nógvar ymiskar orsøkir til tað. Og í staðin fyri at sita einsamallur er gott at hava onkran at vera saman við jólaaftan.

Í KFUK í Havn hevur jólaaftan verið hildin á hvørjum ári síðani 1993, og tað verður tað eisini í ár. Og aftur í ár verða tað Sonja Klein og Holger Arnbjerg, sum saman við Jørgen Dahl fara at skipa fyri hesum tiltaki, ið plagar at vera sera hugnaligt.

Jólaftan í KFUK verður hildin á sama hátt sum hjá teimum flestu. Fólkini møta kl. 19.00 til búgvið borð. Tey fáa jóladøgurða við øllum tí, sum plagar at hoyra til. Oman á er rís á la mande við mandlugávu. Jólaevangeliið verður lisið og jólasálmar sungnir. Sjálvandi verður jólatræ at dansa um og øll fáa persónligar jólagávur.

Umleið 25 fólk plaga at halda jól saman í KFUK.

Er onkur, sum kundi hugsað sær at sloppið við bili til jólaaftanshaldið, skulu tey boða frá. Syrgt verður eisini fyri at øll koma trygt heimaftur.

Fyri at hava nóg mikið at mati og gávur til øll er neyðugt at tekna seg til jólaaftanshaldið. Freistin at tekna seg er 22. desember á middegi, og til ber at tekna seg í KFUK, tlf. 311928, ella hjá Sonju og Holger á tlf. 310177.




























